**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 82/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fyrisiting av sjófeingi (**Leingjan av fiskidagaskipan fyri 2019)

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, Høgni Hoydal, hevur lagt málið fram tann 14. desember 2018, og eftir 1. viðgerð tann 17. desember er tað beint Vinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 18. desember 2018.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í fiskivinnumálum, Høgna Hoydal.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Jørgen Niclasen, Bjørn Kalsø, Jákup Mikkelsen og Jógvan Skorheim) vísir til viðmerkingarnar í løgtingsmáli nr. 72/2018 og mælir til, at tað uppskotið verður samtykt.

Fellur løgtingsmál nr. 72/2018, mælir meirilutin til, at uppskotið, sum fyri liggur, verður samtykt.

**Minnilutin** (Bjørt Samuelsen, Bjarni Hammer og Ingolf S. Olsen) vísir á, at eftir uppskotinum frá landsstýrismanninum heldur fiskidagaskipanin fram í 2019 eftir sama leisti sum í 2018.

Landsstýrismaðurin hevur sett í gongd arbeiði, har Fiskimálaráðið, saman við Havstovuni og vinnuni, eftirmetir skipanina í fiskiskapinum eftir botnfiski í føroyskum sjógvi. Í tí sambandi skulu umsitingarætlanir eisini gerast fyri henda fiskiskapin.
Arbeiðið verður ætlandi liðugt tíðliga í vár, og tí er neyðugt at leingja verandi skipan við fiskidøgum í eitt ár.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Vinnunevndin, 18. desember 2018**

| | | |
|---|---|---|
| Bjørt Samuelsen<br>formaður | Jørgen Niclasen<br>næstformaður | Bjarni Hammer |
| Ingolf S. Olsen | Bjørn Kalsø | Jákup Mikkelsen |
| | Jógvan Skorheim | |